# Øll vilja síggja Homer

Nýggi biograffilmurin um the Simpsons fekk eina kanónbyrjan, tá hann varð frumsýndur um vikuskiftið. The Simpsons Movie spældi nærum 400 milliónir krónur inn longu fyrstu tveir dagarnar, og tað ger, at filmurin í løtuni er best umtókti bio-filmurin í USA. Enn er tó nakað upp til Spiderman 3, sum fyrsta vikuskiftið spældi ikki minni enn 806,7 mió krónur inn.



# Russar vilja hava Volvo

Oleg Deripaska, ið er ein av nýggju oligoarkunum í Russlandi, sigst vera áhugaður í at keypa bæði Jagur, Land Rover og Volvo bilasmiðjurnar. Ford, sum eigur tey trý merkini, váttar, at samráðingar eru um eina møguliga sølu av Jaguar og Land Rover. Men enn verður tó einki sagt um, hvørt talan verður um eina yvirtøku av Volvo eisini.

## Jógvan Hansen nummar eitt

**Tað gongur strúkandi hjá Jógvani Hansen í Íslandi**

TÓNLEIKUR

*dagfinn@sosialurin.fo*

Síðani Jógvan Hansen vann X Factor kappingina í Íslandi, og fløga kom út, hevur gingið strúkandi hjá Jógvani.

Endurinnspælingin av lagnum Rooftop gjørdist beinanvegin nummar eitt á listunum, og fløgan gjørdist skjótt nummar eitt á sølulistanum yvir mest seldu fløgur.

Tað er ein fegin Jógvan Hansen, sum kann siga úr Íslandi, at enn gongur líka væl, og at fløgan enn er væl dámd, og liggur nummar eitt á listunum yvir mest spældu og mest seldu fløgur í Íslandi.

Jógvan Hansen fer á pall á Summarfestivalinum við manning úr X Factor kappingini.

# Búskapurin er ikki ov heitur

**Fyrrverandi landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Bárður Nielsen, metir ikki, at reyðu búskaparlampurnar lýsa. Sostatt er hann ikki heilt samdur við Magna Laksáfoss, sum nú situr við fíggjarmálum og metir búskapin gløða og reyðu ávaringarlampurnar lýsa**

BÚSKAPUR

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



*- Eg eri ikki samdur við Magna Laksáfoss í, at tað er so álvarsligt, at reyðu lampurnar lýsa, sigur Bárður Nielsen, fyrrverandi landsstýrismaður í viðmerking til metingarnar hjá sitandi landsstýrismanninum í fíggjarmálum*

Fyrrverandi og núverandi landsstýrismenn eru ikki samdir um, hvussu búskapurin hevur tað.

Magni Laksáfoss, landsstýrismaður í fíggjarmálum, segði í síðstu viku við Sosialin, at búskapurin gløðir og at reyðu lampurnar lýsa. Hann mælti til at tálma her og nú, og hansara boð vóru at útseta Sandoyartunnilin og at minka sjómannafrádráttin.

Magni Laksáfoss metti heilt einfalt, at tað var ein spurningur um, hvussu nógv virksemi kundi vera í gongd í senn.

### Bárður ikki samdur

Tað er ikki so langt síðani, at Bárður Nielsen fór úr sessinum sum landsstýrismaður í fíggjarmálum, fyri at taka við sum stjóri fyri størstu byggiætlan í Føroyum, nevniliga Stórutjørn.

Bárður Nielsen eigur at hava eina meting um, hvussu búskapurin er fyri, tí hann hevur sitið í landsstýrissessinum fyri stuttum, og hann er ikki heilt samdur við Magna Laksáfoss.

- Eg eri ikki samdur við Magna Laksáfoss í, at tað er so álvarsligt, at reyðu lampurnar lýsa. Men eg eri samdur við honum í, at alt koyrur sera skjótt í løtuni. Tað sæst millum annað á, at arbeiðsloysið er met lágt. Tað er næstan óhoyrt, at tað kann vera so lágt, sum hjá okkum, sigur Bárður Nielsen.

### Steðga Sandoyartunnlinum

Magni Laksafoss mælti í síðstu viku til at tálma búskapinum og at gera hetta við at steðga Sandoyartunnlinum og minka sjómannafrádráttin.

- Vit hava ikki góðar royndir av at gera so harðlig tiltøk, ella tálma ov harðliga, sigur Bárður Nielsen, fyrrverandi landsstýrismaður.

- Hinvegin hava vit í mong ár roynt at tálma, leggur Bárður Nielsen afturat.

Onki búskaparkrakk á veg

At Bárður Nielsen setir seg á odda fyri so stórari privatari byggiætlan, sum Stórutjørn, bendir ikki á, at hann metir búskapin vera ov heitan ella at hann metir vanda vera á ferð.

- Tað er ikki uppgávan hjá tí privata at tálma búskapinum, men at gera íløgur. Tað almenna kann tálma almennu útreiðslunum, sigur Bárður Nielsen.

Men tú metir ikki, at eitt búskaparkrakk er á veg, tá tú setir teg á odda fyri so stórari ætlan, ella hvussu?

- Nei, sjálvsagt ikki. Um vit mettu, at búskapurin gløddi, ella at eitt krakk var á veg, so fóru vit als ikki undir hetta, sigur Bárður Nielsen.

### Útlendsk arbeiðsmegi

Bárður Nielsen sær ikki vandatekin, hóast ferð er á búskapinum, og hann hevur sínar metingar.

- Í mínari verð er ongin ivi um, at vit eiga at lata upp fyri útlendskari arbeiðsmegi. Tað eigur at ganga báðar vegir, og føroyingar arbeiða allastaðni og hava altíð gjørt tað. Tað ber ikki til, at tað gongur so illa at fáa útlendska arbeiðsmegi inn, meðan føroyingar fáa arbeiðsloyvi uttan hóvasták alla aðrastaðni, sigur Bárður Nielsen, og gevur harvið sítt íkast til kjakið um, hvørt útlendingar skulu inn á føroyska arbeiðsmarknaðin, tá føroyingar ikki sjálvir klára at nøkta eftirspurningin á arbeiðsmegi.

### Í gongd í vár

Viðvíkjandi Stórutjørn sigur Bárður Nielsen, stjóri fyri verkætlanini, sum óivað er hin størsta í søgu Føroya, at teir nú arbeiða av øllum alvi við tekningum og loyvum.

- Í apríl komandi vár verður farið í gongd, sigur Bárður Nielsen.


Sosialurin
VALSTRÍÐ VI NÝGGJUM VÁPNUM
LAMPAN GLØÐIR REYTT
Auto

*Forsíðan á Sosialinum mikudagin, har Magni Laksáfoss ávaraði um, at búskapurin gløðir*

# Stanley hugtók í Svøríki

**Stanley Samuelsen hugtók um vikuskiftið í Svøríki. Leiðin gongur nú heim til Føroya. Ein svii helt, at guitarspælið hjá Stanley mátti vera "playback"**

TÓNLEIKUR

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Um vikuskiftið hevur Stanley Samuelsen spælt tvær konsertir í Svøríki. Í Dyrø í Bohuslan fríggjakvøldið og á Helsingborgfestivalinum leygarkvøldið. Gestirnir vóru hugtiknir av sanginum og guitarspælinum og føroyska lagið Regn hugtók, eins og Morgendagens lys, sum er um eina gentu, sum doyði í tsunamivanlukkuni í 2004, og hendingin rørdi sviar at hjartanum.

Fríggjakvøldið var ein búgvin harri, ið spurdi, um guitarspælið var spælt inn áðrenn á fløgu, altso playback, tí so væl helt hann ongan vera føran fyri at spæla á palli.

Hæddina náddi Stanley, tá hann sang sang eftir Cornelis Vreeswijk; "Somliga går i trasiga skor..". Tá vóru svendku áhoyrararnir veruliga við.

Eftir Stanley kom Per Sorman á pall, ein av størstu troubadourum í Svøríki, og hann segði soleiðis um gutarspælið hjá Stanley; " Vi har netop oplevet tre guitarister på scenen på samme tid , men de to af den var usynlige. Takk Stanley du er fantastisk".

Stanley er aktuellur á Summarfestivalinum komandi vikuskiftið.



*Stanley spældi í Svøríki um vikuskiftið og hugtók áhoyrararnar. Um nakrar dagar fer hann á pall á Summarfestivalinum*
*Mynd: M. Messmann*